

*Byrjanin hjá landingarmiðstøðini í Sørvági var trupul, men nú gongur betri, sigur Vinjard Joensen ( Mynd: Edvard Joensen)*

# Nú sær betri út

*Landingarmiðstøðin í Sørvági fekk eina tunga byrjan. Tvey tey fyrstu árini vóru vánalig til fisk. Men nú flakavirkið er komið, sær betri út*

Edvard Joensen

Tvey tey fyrstu árini vóru linlig, sigur Vinjard Joensen, sum eigur landingarmiðstøðina í Sørvági. Lítið av fiski kom upp á land. Men nú Flakavirkið er byrjað aftur, er líkt til, at fleiri bátar avreiða í Sørvági.

Vinjard Joensen lat landingarmiðstøðina upp í mai mánað 1998. Hann sigur, at tað hevur verið heilt óvanliga slakt við fiski hesi bæði árini. Minni enn menn vitaum, sigur hann.

Slíkt er sera tungt at arbeiða við, og tað hevur bara borið til við at halda útreiðslunum niðri, sigur Vinjard Joensen. So hann og familjan hava arbeitt rættiliga nógvar bíligar tímar, greiðir hann frá.

Men nú er nýtt flakavirkið latið upp í Sørvági, og tað sær út til at draga eitt sindur av fiski við sær. Tað koma fleiri bátar at landa, sigur Vinjard Joensen. Eitt sindur betri hevur tað eisini verið til fiskarí, letur hann at.

Hendan dagin, Sosialurin vitjaði í Sørvági, lá Vesturvarði og landaði til flakavirkið. Mest kongafisk, sum varð vigaður og skildur inni á landingarmiðstøðini hjá Vinjardi. Eisini høvdu nakrir bátar verið á útróðri dagin fyri, og tann fiskurin stóð inni á støðini klárur at selja um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya á Toftum.

Vinjard Joensen sigur, at teir arbeiða í tøttum samstarvi við Fiskamarknaðin. Og tað loysir seg eisini há teimum, sum avreiða. Útróðrarmenninir eru væl nøgdir við, at teir sleppa av við fiskin í Sørvági og ikki skulu hava útreiðslur av at koyra hann inn á Toftir.

Millum kassarnar var ein við væl av kalva í. Ein bátur hevði verið við kalvalínu dagin fyri, og tað hevði bara hepnast væl. Teir avreiddu fyri einastaðni millum 30.000,- og 35.000,- krónur hendan dagin.

Annars eru tað bæði trolarar og línubátar, sum saman við útróðrarbátunum leggja upp til landingarmiðstøðina í Sørvági, sigur Vinjard Joensen.

Ein truckur kemur inn í høllina við einum kassa av kongafiski frá Vesturvarða. Fiskurin verður stoyttur í eitt vaskikar, haðani hann fer ígjøgnum skiljilinjuna, sum skilir hann í støddir. Tað standa fleiri kassar undir portrunum út eftir gólvinum, og har fer fiskurin í eftir stødd.

Vinjard fer upp á ein platt at syrgja fyri, at fiskur alla tíðina kemur til flutningsbandið, sum føðir sjálva skiljilinjuna, har ein ungur maður stendur og ansar eftir, at alt gongur, sum tað skal.

Vinjard Joensen sigur, at hann plagar at hava ungdómin til arbeiðis, tá tað ber til. Tey skulu eisini lærast.

Men lærararnar skilir hann ikki. Skulkar ein raskur, ungur drongur tveir tímar úr skúlanum, eru teir eftir honum beinanvegin. Men sjálvir hava teir nú verið burtur frá í tveir mánaðar.

-Nei, eg veit einki, sigur hann og ristir við høvdinum.

Men tað er trupult at hava virki koyrandi í Vágum, letur Vinjard at. Flutningsmøguleikarnir eru ikki nóg góðir. Tað er alt ov ofta, at tað steðgar upp um Vestmannasund. Tað kunnu ganga tímar at bíða eftir flutningi, og tað kostar nógv.

Vinjard gleðir seg til undirsjóvartunnilin.

# Jørðin nýtast til vinnuligt endamál

*Við støði í galdandi lóggávu fer Vinnumálastýrið at miða ímóti at byggja upp eina fyrisiting, sum er væl samskipað, gera greiðar og vællýstar mannagongdir og virka á høgum tænastu- og vitanarstigi, sigur Finnbogi Arge m.a. í tilmælinum viðvíkjandi framtíðar landbúnaði í Føroyum*

Ólavur í Beiti

– Sambært lógargrundarlagnum fyri landbúnaðin, er endamálið við landsjørðini, at hon í mest møguligan mun skal verða rikin sum vinnuligt jarðarbrúk, og hevur festari í hesum sambandi skyldu til at leggja tilrættis framleiðsluna í mun til marknaðarviðurskiftini, og hvat má haldast at vera fíggjarliga ráðiligt.

– Fyrisitingin av landsjørðini er við lóg løgd til Jarðarráðið. Tað vil siga, at Jarðarráðið skal fremja útinningina av ásetingunum í galdandi lóggávu og hava eftirlit við, at hesar verða fylgdar. Við øðrum orðum eru umstøður nú fyri at seta í verk eina professionella fyrisiting av landsjørðini, herundir at fáa til vega neyvari stýringsamboð til at fremja endamálið við lógini, tað vil siga: »at tað fyrisitingarliga skulu skapast møguleikar fyri at menna framleiðsluna av landsjørðini« og ásetingina í lógini um at »festari m.a. hevur bústaðarskyldu og skyldu at framleiða av festinum mest møguligt sæð í mun til marknaðarviðurskiftini, og hvat annars má haldast at vera fíggjarliga ráðiligt«, sigur Finnbogi Arge m.a. í drúgva tilmælinum um framtíðar landbúnað í Føroyum.

Og víðari sigur landbúnaðarmálaráðharrin, at av tí at eingin samanhangandi politikkur nakrantíð er orðaður fyri landbúnaðin, er ilt at meta um góðskuna av jarðarfyrisitingini higartil, tí einki ítøkiligt er at meta hana útfrá. Áðrenn - ella um - ítøkilig stig verða tikin til møguligan broyttan bygnað í landbúnaðinum og harav fylgjandi broytingum í galdandi lóggávu, er neyðugt at hava greiðar ætlanir fyri landbúnaðin, sum verða at staðfesta í einum ítøkiligum landbúnaðarpolitikki.

### 150 festir

– Mett verður, at tað á umleið 150 festum kunnu vera møguleikar og umstøður fyri vinnuligum landbúnaðarvirksemi burturav. Fyri hinar festarnar skulu betri umstøður skapast fyri at fáa eina møguliga hjávinnu við síðuna av landbúnaðarvøruframleiðsluni. Ætlanirnar fyri framtíðar landbúnaðin snúgva seg í høvuðsheitum um at tátta í útinningina av ásetingunum í galdandi lóggávu, og við heimild í hesi lóggávu at seta í verk greiðar fyrisitingarligar mannagongdir, so trygd fæst fyri, at endamálið í galdandi lóg verður rokkið.

– Jørðin skal, har tað ber til, nýtast til vinnuligt endamál, og fær tað avleiðingar fyri framíhjárætt festarans, tá misrøkt og skyldur mótvegis Jarðargrunninum ikki verða hildnar, sigur Finnbogi Arge í tilmælinum.

Og mælt verður Løgtinginum til at taka undir við ætlanunum fyri framtíðar landbúnaðin og setta stevnumiðið. Tað er, at landbúnaðurin - sum vinnugrein - skal vera fjøltáttaður, burðardyggur og so vítt gjørligt kappingarførur. Landbúnaðurin skal eisini elva til livandi útoyggjar og varðveitslu av náttúruni, og lagast til krøv brúkarans um matdygd og -tryggleika, umhvørvisvernd, djóraheilsu og vælferðina hjá húsdjórum.

– Við atliti at hesi fjøltáttan skulu setast í verk greiðari fyrisitingarligar mannagongdir, herundir vinnufremjandi tiltøk, ið hava til endamáls at menna landbúnaðarvinnuna. Endamálið við landsjørðini er, at jørðin - við virðing fyri omanfyrinevndu fjøltáttan - verður rikin sum vinnuligt jarðarbrúk, sigur Finnbogi Arge m.a. í tilmælinum.








*Nýggju átta metur kørini fara at økja framleiðsluna hjá Gjáarsmolti við eini helvt, sigur Sofus Johannesen, nevndarformaður ( Mynd: Jens Kristian Vang)*

# Gjáarsmolt byggir út

*Nýggj høll er bygd, sum ger, at framleiðslan er økt við umleið eini helvt. Samstundis er nýtt biofilturannlegg gjørt, so vatnið verður endurnýtt*

Edvard Joensen

Gjáarsmolt økir framleiðsluna við umleið eini helvt. Úr 800.000 smoltum upp í 1,2 milliónir smolt árliga. Hendan økingin er møgulig, tí ein nýggj høll við fýra stórum kørum er bygd.

Sofus Johannesen, nevndarformaður í Gjáarsmolt, sigur at teir tóku tíggju fimm metur kør niður og settu fýra átta metur kør upp aftur í staðin. Hesi fýra nýggju kørini rúma umleið dupult so nógv sum tey tíggju, sum vórðu niðurtikin, sigur Sofus Johannesen.

Í fiskatali verður munurin nógv størri. Í hesum nýggju átta metur kørunum ganga umleið 100.000 fiskar í hvørjum, meðan tað eru umleið 15.000-16.000 fiskar í einum fimm metur kari.

Tá tosað verður um fimm og átta metur kør, er tað diametur, nevnt verður. Átta metur kørini eru eisini væl hægri enn hini, tí verður rúmmunurin so stórur.

Eisini fær støðin biofiltur, soleiðis, at vatnið verður endurnýtt. Tað vil siga, at sama vatnið fer fleiri ferðir í gjøgnum anleggið, áðrenn tað fer á sjógv. Vatnið verður hitað. Hitin fer at liggja um eini 16-18 stig. Hetta er ikki heilt klárt enn, men roknað verður við, at um einar tvær vikur, verður alt liðugt.

Hetta, at kørini standa inni, ger, at tað ber til at stýra vøkstrinum væl betri, og úrtøkan verður eisini nógv størri av tí sama, sigur Sofus Johannesen. Til ber við ljósregulering at gera kunstigan vetur nær sum helst á árinum, og soleiðis kann altíð latast smolt at seta út, sigur hann.

Miðað verður eftir, at rognini komandi ár eisini skulu hitaregulerast, soleiðis at klakt verður einar seks vikur fyrr á árinum. Á tann hátt ber til at hava heyst-smolt í hampiligari stødd longu í juli mánaða.

Teir hava ikki lívfisk sjálvir norðuri við Gjógv. Rognini fáa teir frá Fiskaaling og av Fútakletti.

Alt smoltið frá Gjáarlaks hevur higartil verið selt til Faroe Salmon, sum hevur alistøðir í Norðoyggjum. Men nú framleiðslan er økt so munandi, verður helst eisini selt aðrastaðni, sigur Sofus Johannesen.

Farið varð undir hesa útbyggingina seinasta summar, og nú er um tað lagið, at alt er liðugt. Fiskur hevur verið í nýggju kørunum síðan hálvan januar mánaða.

Sofus Johannesen sigur, at teir fara at seta út nú fyrsta dagin. Og tá teir so um einar fjúrtan dagar fara at seta yngul í aftur stóru kørini, skuldi biofiltur skipanin verið liðug, soleiðis at vatnið kann hitast. Tá fer fiskurin at vaksa nógv skjótari enn fyrr.

Hendan útbyggingin, sum nú er gjørd, kostar umleið seks milliónir krónur við allari teknisku útgerðini, sigur Sofus Johannesen. Og tað metir hann, at Gjáarsmolt klárar. Felagið er hampiliga væl fyri, og eingin trupulleiki hevur verið við at fingið fígging, sigur hann.

Tað arbeiða í løtuni fimm mans hjá Gjáarsmolt. Hendan nýggja útbyggingin hevur gjørt, at tann fimti júst er komin aftrat teimum fýra, sum annars vóru fast á støðini.

# Vanligt vikuskifti

*Einki soleiðis út yvir tað vanliga er komið á politirapportina í Havn um vikuskiftið*

Edvard Joensen

Seinasta vikuskiftið var stilt og friðaligt, verður sagt av politistøðini í Havn.

Eini fýra smærri ferðsluóhapp vóru.

Til dømis koyrdi ein bilur út, har hann annars hevði treytaleysa víkiskyldu. Og tíverri var ein annar bilur, sum helt væl standa til og koyrdi, har hann átti. Men samanstoytur varð.

Eingin fólkaskaði hendi tó í nøkrum av hesum ferðsluóhappunum, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn.

Tríggir vórðu tó tiknir fyri at koyra við kenning um vikuskiftið. Av hesum var ein, sum koyrdi á prutli. Og tað er ikki loyvt at koyra ávirkaður á prutli heldur enn í bili, so hann fær eina bót fyri tað.

Okkurt herverk hevur verið, umframt tvey innbrot.

Og sum so mangan, varð løgreglan eisini boðsend í samband við húsaófrið.

Nakað av fullum fólkið hevur gingið í býnum um vikuskiftið, sigur vakthavandi.

Seks hava tey havt á støðini at sova rúsin út. Fólk, sum eru avdottin ella bara ikki vinna upp hús og ikki duga at siga frá, hvar tey búgva.

Eitt skifti leygarmorgunin vóru tríggir inni í senn, verður sagt av politistøðini í Havn.

Eitt størri mál hevur løgreglan tó havt um vikuskiftið. Tað er málið við trolaranum Sæborg, sum vaktarskipið Gorm tók norðanfyri.

Tað málið verður skrivað um aðrastaðni í blaðnum.

